## Ferðavinnan gevur minni

Útlitini hjá donsku ferðavinnuni eru vánalig, og sambært Børsen fara vinnurekandi í ferðavinnuni at fáa millum eina og tvær milliardir krónur minni í inntøkum tríggjar teir næstu mánaðirnar enn somu mánaðir í fjør. Formaðurin hjá ferðavinnuni, Dorte Kiilerich, sigur við blaðið, at tað eru serliga tað lága virðið ná svensku krónuni og altjóða fíggjarkreppan, sum órógva donsku ferðavinnuna. Tað fyrra ger, at nógv ferðafólk leita sær til Svøríkis, og tað seinna ger, at fólk ferðast yvirhøvur minni enn undanfarin ár, tá tey høvdu meiri pengar um hendi.

## Fiat í keypshugi

Italska bilverksmiðjan Fiat er í sonnum keypshugi í hesum døgum. Fyri stuttum kunngjørdi fyritøkan, at hon er hugað at keypa svensku bilverksmiðjuna Saab, og nú frættist, at hon hevur eisini hug á Opel/Vauxhall, sum eins og Saab eru dótturfeløg hjá amerikanska General Motors. Tað er kortini ikki bara Fiat, sum hevur hug at keypa Opel/Vauxhall, tí eigararnir hava eisini fingið eitt boð frá altjóða íleggingarfelagnum RHJ International. Týska stjórnin, sum roynir at bjarga bilídnaðinum, hevur sagt, at tann, sum keypir Opel/Vauxhall, kann fáa lánsveðhald frá stjórnini, um tørvur er á tí.

# Slíkar stevnur hava stóran týdning

**Havnarfeløgini missa niðara vøll at venja á í eina viku ella so, meðan sølustevnan Fish Expo 09 verður hildin. Hetta er gjørt í samráð við HB og B36, sigur Heðin Mortensen**



*Menn eru í ferð við at gera klárt til Fish Expo 09, sum letur upp mikudagin og varar til fríggjadagin í komandi viku*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

SØLUSTEVNA

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað hevur volt til nakað av ónøgd, at niðari vøllur í Gundadali verður nýttur til sølustevnu, og harvið ikki kann brúkast til hvørki venjing ella dystir í eina viku.

Men Heðin Mortensen, borgarstjóri, sigur, at hetta tiltakið er gjørt í samráð við HB og B36, og at Tórsvøllur er tøkur til venjingar hjá feløgunum, meðan niðari vøllur er upptikin.

Spurnartekin hevur verið sett við, um Tórsvøllur tolir so nógva nýtslu, nú bert tvær vikur eru eftir til landsdysturin móti Serbia skal spælast, men tí óttast Heðin Mortensen ikki fyri.

Hinvegin leggur hann dent á, hvussu nógv ein slík sølustevna hevur at siga fyri Havnina.

- Niðari vøllur í Gundadali liggur sera væl fyri. Tað er tætt við miðbýin, og har eru allir hugsandi fasilitetir beint við. Har er Norðurlandahúsið, Svimjihøllin og Listasavnið, alt nakað, sum lættliga kann brúkast, og sum ikki er neyðugt at koyra til, sigur Heðin Mortensen.

Hendan sølustevnan hevur áður verið hildin uppi á Sandvíkarhjalla, men Heðin Mortensen sigur, at hon liggur munandi høgligari fyri í Gundadali.

- Fólk kunnu spáka til stevnuna allastaðni frá. Talan er eisini um nógvar framsýnarar, 134 í tali frá fleiri londum, so tað sigur seg sjálvt, at stevnan hevur stóran týdning, sigur Heðin Mortensen.

Hann heldur ikki, at tað órógvar fótbóltin í størri mun, at stevnan verður hildin á niðara vølli í Gundadali.

- Tórsvøllur er jú tøkur hjá feløgunum, og kommunan eigur jú alt økið í Gundadali, sigur Heðin Mortensen.

Borgarstjórin, sum er farin til Íslands í dag, er tí sera spentur upp á, hvussu stevnan fer at hildnast.

- Hon verður í hvussu er hildin á einum høgligum stað, sigur Heðin Mortensen.

# Bíða eftir landinum

**Vit mugu fáa tað fíggjarliga upp á pláss, áðrenn støða verður tikin endaliga til ætlaða røktarheimið yviri við Strond, sigur Heðin Mortensen, borgarstjóri**

RØKTARHEIM

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tórshavnar býráð hevur fleiri uppskot liggjandi til røktarheim yviri við Strond. Hesi eru sum skilst munandi bíligari enn upprunaliga uppskotið frá donskum arkitektafelag.

- Tað einasta, sum stendur púra greitt er, at vit hava slept øllum ætlanum um at byggja eftir tí uppskotinum, sigur Heðin Mortensen.

Hann sigur, at tað í løtuni verður arbei tt við fíggjarliga partinum av ætlanini, og at onkur fundur hevur verið við Rósu Samuelsen, landsstýriskvinnu í almannamálum.

- Enn er einki endaligt komið upp á pláss, men tað skuldi verið undarligt, um ikki landið letur sín stuðul til bygging í Suðurstreymi eisini, sigur Heðin Mortensen.

Enn bíðar býráðið eftir endaligum svari frá tí almenna, og áðrenn tað er komið, ber illa til at gera nakað.

-Tørvurin á røktarplássum er staðfestur her í Suðurstreymi, og so skjótt sum landið meldar út um sín stuðul, verður farið í gongd við at byggja, sigur Heðin Mortensen.

Sjálvur hevur hann góðar vónir um, at farast kann undir byggingina skjótt, og hann dugir ikki at síggja, hví landið ikki skuldi latið stuðul til hesa byggingina.

- Tíðirnar eru soleiðis, at vit ikki kunnu fara undir byggingina sjálvir. Tað er neyðugt, at landið letur sín stuðul til røktarheimið, eins og teir gera aðrastaðni, sigur Heðin Mortensen.

Ætlaða røktarheimið yviri við Strond er ætlað at húsa 24 búfólkum, og uppskotið hjá Magnusi Hansen, sum Sosialurin skrivaði um herfyri, er ætlað at verða bygt í modulum. Hetta merkir, at byggingin kann ganga skjótt fyri seg, eins og kostnaðurin bert er eina helvt av tí, uppruna uppskotið varð mett at kosta. Uppskotið hjá Magnus Hansen liggur um eina millión fyri hvørja búeind, meðan danska uppskotið lá um 2,2 milliónir fyri hvørja búeind.

Stuðulin hjá landinum er 700.000 krónur fyri hvørja búeind. Tað merkir, at verður tikið av uppskotinum hjá Magnus Hansen, verður kostnaðurin hjá kommununi góðar 7 milliónáir krónur, og tað ljóðar sum ein yvirkomilig upphædd.

Men – sum Heðin Mortensen undirstrikar – so er neyðugt, at landið letur sín stuðul, skal ætlanin um røktarheim yviri við Strond gerast til veruleika.



*Skal uppskotið um røktarheim yviri við Strond gerast veruleiki er neyðugt, at landið letur sín stuðul til verkætlanina, sigur Heðin Mortensen*